FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

17. januar 2024
J.nr: 24/00698-4

Svar upp á spurning nummar 52-068/2023, skrivligur spurningur eftir § 52a frá Kim Durhuus til Ruth Vang viðvíkjandi afturbering av MVG á leigubilum og afturbering av virðisgjaldi, tá bilar verða útfluttir úr Føroyum

Sprningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu nógvir nýggir leigubilar vórðu skrásettir í Føroyum í 2021, 2022 og 2023?
2. Hvussu nógv hevur landskassin goldið í MVG-afturbering fyri hesar bilar í 2021, 2022 og 2023?
3. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at endurskoða reglurnar um MVG-afturbering á leigubilum?
4. Hvussu nógvir bilar eru útfluttir úr Føroyum í 2021, 2022 og 2023?
5. Hvussu nógv hevur landskassin goldið aftur í virðisgjaldi fyri hesar útfluttu bilar í 2021, 2022 og 2023?
6. Hvussu nógvir av hesum bilum vóru yngri enn 1 ár í 2021, 2022 og 2023?
7. Hevur landstýriskvinnan ætlanir um at endurskoða reglurnar um afturbering av virðisgjaldi, tá bilar verða útfluttir úr Føroyum?

Svar

Spurningur nr. 1
Sambært hagtølum frá Akstovuni pr. 15. januar 2024 er talið av akførum skrásett sum útleigan hesi:

2021: 530
2022: 721
2023: 702

Spurningur nr. 2
Fyrstu ferð ein leigubilur verður skrásettur, so verður mvg´ið endurrindað eins og talan er um aðrar bilar, sum eru keyptir í vinnuligum høpi. TAKS hevur ikki hagtøl upp á hesa endurrindanina, tí talan er ikki um nakra serstaka uppgerð.

Tá leigubilar eftirfylgjandi verða seldir, fær felagið, sbrt. § 10, stk. 2 í mvg-lógini ein frádrátt á í mesta lagi 60.000 kr., ið feløgini sjálvstøðugt draga frá í útgangandi avgjaldinum á teirra mvg-uppgerð.

TAKS fær ikki innlit í útrokningini av mvg-uppgerðunum hjá feløgunum uttan so, at roknskapartilfarið hjá feløgunum verður kallað inn. Tískil kann ikki staðfestast neyvt, hvussu nógv feløgini hava drigið frá fyri leiguakfør í útgangandi avgjaldinum á teirra mvg-uppgerðum. Kortini ber til at staðfesta, at frádrátturin fyri seld leiguakfør í útgangandi avgjaldinum fyri 2021-2023 í mesta lagi hevur verið:

2021: 400 x 60.000 kr. = 24.000.000 kr.
2022: 357 x 60.000 kr. = 21.420.000 kr.
2023: 86 x 60.000 kr. = 5.160.000 kr.

Spurningur nr. 3
Samgongan hevur sett sær fyri at endurskoða undantøkini í mvg-lógina eins og onnur almenn avgjøld. Enn er støða ikki tikin til, hvørt reglurnar viðvíkjandi afturbering av mvg og virðirgjaldi av leigubilum verða partur av endurskoðanini.

Spurningur 4
Niðanfyri er víst samlað yvirlit yvir útfluttar bilar í tíðarskeiðnum 2021-2023. Skilt verður millum bilar, útfluttir sum vrak og aðrar bilar.

	2021	2022	2023
Útflutt akfør í alt	107	215	275
Útflutt (vrak)	76	66	88
Útflutt (ikki vrak)	31	149	187

Spurningur 5
Niðanfyri er víst yvirlit hvussu nógv er endurrindað í virðisgjaldi av útfluttum akførum í tíðarskeiðnum 2021-2023

	2021	2022	2023
Endurrindað virðisgjald	1.448.278 kr	9.127.290 kr	7.776.426 kr

Spruningur 6
Niðanfyri er víst yvirlit yvir hvussu nógvir bilar eru útfluttir frá 2021 til 2023 býtt eftir vrak og aðrar bilar, og um bilarnir eru útfluttir innanfyri 1 ár ella aftaná 1 ár.

	2021	2022	2023
Útflutt (vrak)	76	66	88
yngri enn 1 ár.	1	0	1
eldri enn 1 ár.	75	66	87
Útflutt (ikki vrak)	31	149	187
yngri enn 1 ár.	**3**	**83**	**129**
eldri enn 1 ár.	28	66	58
Útflutt akfør í alt	107	215	275

Spurningur 7
Samgongan hevur sett sær fyri at endurskoða undantøkini í mvg-lógina eins og onnur almenn avgjøld. Enn er støða ikki tikin til, hvørt reglurnar viðvíkjandi afturbering av mvg og virðirgjaldi av leigubilum verða partur av endurskoðanini.

Tinganes, tann 17. januar 2024

Ruth Vang
landsstýriskvinna